

## Ikki kreppa millum USA og Ísrael

Teir seinastu dagarnar hava fleiri amerikanskir politikarar funnist hvassliga at ísraelsku ætlanini at byggja 1600 íbúðir í Eystur Jerusalem, men Barack Obama, forseti, avsannar, at kreppa er millum londini bæði. Í gjárkvøldið spurdi sjónvarpið Fox News forsetan, um viðurskiftini er so vánalig, at talan er um eina kreppu. Svarið var nei. Barack Obama segði, at tað áliggur ísraelsmonnum og palestinum at tryggja, at teir ikki taka nøkur stig, sum kunnu leggja fót fyri amerikonsku royndunum at fáa friðarsamáðingarnar í gongd aftur.




*Tórshavnar kommuna vil leggja fútabann á 10. flokk í Tórshavnar kommunuskúla. Skúlastjórin undrast á framferðina hjá kommununi, at miðlarnir vita um hetta, áðrenn skúlin verður kunnaður*

*Tilgjørd mynd*

Tórshavnar býráð óvanligt stig:

# Vil hava fútabann móti Kommunuskúlanum

**Klokkan níggju í morgun handaði sakførarin hjá Tórshavnar býráð, Jógvan Páll Lassen, eina áheitan á fútan um at seta fútabann móti ætlanum kommunuskúlans at seta á stovn 10. flokk skúlaárið 2010/2011**

FÚTABANN

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Málið um 10. flokk í Kommunuskúlanum hevur nú fingið eina púra óvanliga og sera dramatiska vend. Klokkan níggju í morgun handaði Jógvan Páll Lassen vegna Tórshavnar býráð eina áheitan á Karen Marie Olesen um at seta fram fútaforboð móti Kommunuskúlanum og ætlanunum hjá leiðslu skúlans at skriva inn 10. flokk fyri skúlaárfið 2010/2011.

Málið er bæði drúgt og fløkt. Longu í 2004 birtust ætlanir um at broyta skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu, og í 2006 varð


Áheitan um fútabann !

Sum advokatur fyri

Tórshavnar kommunu
Vaglið
100 Tórshavn

loyvir undirritaði sær við hesum at heita á Føroya fútarætt um at niðurleggja fútabann í móti

Tórshavnar Kommunuskúla
c/o Hanus Joensen, skúlastjóri
Tórsgøta 25
100 Tórshavn

*Sosialurinum hevur fingið avrit av skrivinum, har Tórshavnar kommuna umvegis sakførarar hevur heitt á fútan at leggja fútabann á kommunuskúlan sum skjótast*

ein arbeiðsbólkur settur at viðgera málið.

- Tað er soleiðis, at ábyrgdin á skúlaøkinum er í fyrsta lagi tvíbýtt millum land og kommunur, og síðani er tað aftur tvíbýtt millum kommunustýri og skúlastýri. Og sambært fólkaskúlalógini hevur kommunustýrið greiða heimild at fremja yvirskipaðar bygnarbroytingar, sum fevna um allan skúlabygnaðin í kommununi, og tað er tað, sum býráðið hevur gjørt við at savna 10. flokkarnar, og sum Mentamálaráðið hevur góðkent, sigur